# TILTØK

**Gudstænastur Nýggjársaftan**
*Havnar kirkja:* kl. 23.15, Jóannis Fonsdal
*Kollafjørður:* kl. 15.30,
*Kvívík:* kl. 18, Bjarni Bæk
*Vestmanna:* kl. 18, Inga Poulsen Dam
*Hósvík:* kl. 18,
*Hvalvík:* kl. 20, Mogens Tilsted Christensen
*Norðskála:* kl. 21,
*Eiði:* kl. 23.15, Emil Olsen
*Gøta:* kl. 17,
*Fríðrikskirkjan:* kl. 23.15, Martin R. Jacobsen
*Leirvík:* kl. 18,
*Fuglafjørður:* kl. 23.30, Uni Næs
*Christianskirkjan:* kl. 20, Niels Pauli Danielsen
*Kunoy:* kl. 19,
*Árnafjørður:* kl. 20, Hans Eiler Hammer
*Sandavágur:* kl. 20, David Johannesen
*Vágur:* kl. 23.30, Patrick de Neergaard
*Selatrað:* kl. 20,
*Skála:* kl. 22,
*Sjóvar kirkja:* kl. 23.15 Jógvan Fríðriksson
*Glyvrar:* kl. 18, lestur
*Viðareiði:* kl. 17, lestur
*Vestmanna:* kl. 18, Inga Poulsen Dam
*Skopun:* kl. 23.15, Jákup R. Hansen

**Nýggjársdag 1. januar**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein (Talvan gongur fyri Danska bíbliufelagið)
kl. 18 altarg., Bjarni Bæk
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Lestur
*Argja kirkja:* kl. 18 Bergur D. Joensen, altarg., Eingin gudstænasta kl. 11
*Kollafjørður:* kl. 12, Mogens T. Christensen. (Í øllum kirkjum í Norðstreymoyar prestagjaldi gongur talvan fyri Det danske bibelselskab)
*Gjógv:* kl. 12, messa
*Funningur:* kl. 17, messa, Emil Olsen. (Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi gongur talvan fyri Bíbliufelagið)
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Martin R. Jacobsen. (Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Bíbliufelagið)
*Rituvík:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Hellurnar:* kl. 12, altarg., Uni Næs
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Kunoy:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen. (Talvan gongur fyri Bíbliufelagiðí Norðoya vestara prestagjaldi)
*Sørvágur:* kl. 12, David Johannesen. (Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Bíbliufelagið)
*Vágur:* kl. 18, altarg., Patricd de Neergaard
*Skála:* kl. 11,
*Sjóvar kirkja:* kl. 12.10,
*Oyndarfjørður:* kl. 18 Jógvan Fríðriksson (Í Sjóvar Prestagjaldi gongur talvan fyri Bíbliufelagið)
*Rituvík:* kl. 18, Meinhard Bjartalíð. (Talvan gongur í Glyvra prestagjaldi fyri Bíbliufelagið)
*Viðareiði:* kl. 17, Elsa Funding. (Talvan gongur fyri Bíbliufelagið)
*Miðvágur:* kl. 12, Inga Poulsen Dam
*Dalur:* kl. 12, Jákup R. Hansen (Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldifyri Bíbliufelagið)

**Sunnudagin 2. januar**
*Vesturkirkjan:* kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen. (Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Bíbliufelagið)
*Havnar kirkja:* kl. 11, Jóannis Fonsdal
*Kaldbak:* kl. 12, altarg., Sonja Klein
*Kvívík:* kl. 12, Inga Poulsen Dam
*Sandavágur:* kl. 12, David Johannesen
*Tjørnuvík:* kl. 12, altarg., Mogens T. Christensen
*Eiði:* kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
*Gøta:* kl. 12, Martin R. Jacobsen
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Fuglafjørður:* kl. 12, altarg., Uni Næs
*Christianskirkjan:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Húsar:* kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
*Porkeri:* kl. 11,
*Sumba:* kl. 12.30, altarg.
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Hvannasund:* kl. 12, Elsa Funding. (Talvan gongur fyri Bíbliufelagið)
*Skálafirði:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Húsavík:* kl. 12, Jákup R. Hansen

**Lívdin í Hoyvíkar Skúla**
Sunnudagin kl. 10.30 Familjumøti og kl. 12 Tilbiðjanarmøti. Útisetar luttaka á báðum møtunum.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Drekkamunnur er millum møtini.
Sunnudagsskúlin er kl. 12.
www.livdin.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
**Vegna jarðarferð** er almenna jólaveitslan sum Heimaforbundið skipar fyri, flutt til fríggjadagin 7. januar.
Nýggjársaftan samlast tey ungu kl. 19.
Nýggjársdag kl. 18 Møti.
Sunnudag kl. 11 Møti við barnasigning. Øll eru vælkomin.

**Frá Ebenezer**
Nýggjársaftan kl. 23 Vaktarmøti.
Nýggjársdag kl. 18 Møti.
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans, kl. 18 Møti.
Øll eru vælkomin.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Nýggjársaftan kl. 22 Nýggjárshald v/ lovsangi og profetiskum proklamatiónum.
Sunnudagin kl. 11 Morgungudstænasta – Tummas Jacobsen talar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Fríggjadagin 31. kl. 11.30 Messa í Kerit.
Nýggjársdag kl. 11.00 Hámessa á kirkjuni.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin 2. januar kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Ejvind Mouritsen, Gratia syngur.
Mánadagin 3. januar kl. 20 Heimsbønarløta.
Týsdagin 4. januar kl. 20 Heimsbønarløta.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Einki møti fyrr enn 9. januar.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Einki møti nýggjársdag, men sunnukvøldið kl. 18 Møti við Jústines Poulsen.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 2. jan. kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum talar Páll Poulsen. Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin 2. januar. www.hebron.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Heðin Lamhauge.

**Saron, Vestmanna**
Morgunmøti verður sunnudagin kl. 11 við breyðbróting, Jóhan Hendrik Hansen talar. Verið hjartaliga vælkomin í Saron. Samkoman ynskir øllum eitt signað nýggjár.

**Meinigheitshúsið, Sandavágur**
Jólafestin verður sunnukvøldið 2. januar kl. 18 við góðum ábiti, boðskapi, sangframførslu, spølum, burturluting o.ø. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 17 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómshúsmøti. Verið hjartaliga vælkomin til møtini.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Nýggjársdag kl. 18 Møti, Marja Lamahuge talar. Olga Magnussen syngur.
Sunnudagin 2. januar kl. 18 Møti, Petur F. Johanesen, Skála talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Sunnudagin kl. 17 Nýggjársveitsla fyri vaksin (tekningarlisti).

**Thabor, Fuglafjørður**
Møti verður nýggjársdag kl. 18 og sunnudagin 2. januar kl. 18.
Alheimsbønarvikan verður í komandi viku.
Bønarmøti verður hvørt kvøld kl. 19.30, tó verður einki 6. januar, trettandakvøld.

**Betesda, Norðoyggjar**
Nýggjársaftan kl. 19: Veitsla fyri vaksin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Nýggjársdag kl. 18 Nýggjársveitsla.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Mogens Nørgård Pedersen, fyrrverandi barnaráðgevari og trúboðari, nú fólkatingsmaður. Kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Jóla- og nýggjársveitsla verður nýggjársdag kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 17.30 Bøn- og lovsangur, kl. 18 Møti. Jólafestin fyri tey vaksnu verður 8. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vitnið, Hvalba**
Nýggjársveitslan fyri vaksin verður 1. januar kl. 19.00 og fyri børn 2. januar kl. 15.00. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Møti verður sunnudagin kl. 18 við Jacob Poulsen og Eyðfinn Mørk. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Nýggjársdag kl. 18.00 Møti, Eyðun Christiansen talar.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti, Eddie Bech talar.
Mikudagin kl. 20.00 Bíbiltími v/ Eingrím Holm. Øll eru vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Leygarkvøldið 8. januar kl. 20.30 verður hugnakvøld v/ Sigrið og Jóannis Fonsdal. Sunnudagin kl. 15 verður Gudstænasta í Háteigskirkju, har Jóannis Fonsdal prædikar. Aftaná verður kaffi í Ørkini.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
**Tilhaldið er opið 20., 21. og 22. desember 2004 frá kl. 10.00-17.00 og letur upp aftur mánadagin 3. januar 2005.**

***Vit í Tilhaldinum ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og eitt av Harranum signað nýár.***

## BRÚDLEYP

Leygardagin 1. januar 2005 kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni Ingeborg Súsanna Jacobsen og Jónleif Lydersen. Veitslan verður fyri innbodnum í Skálanum kl. 18.30. Opið hús verður 2. januar á Bumshamarsvegi 3 og 4.

1. januar 2005 giftast Emma Hansen, Norðragøta og Uni Rasmussen, Søldarfjørður. Opið hús verður frá kl. 19.00 í heiminum hjá Ragnhild og Jafet Rasmussen í Søldarfirði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 1. januar 2005 kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni, Gunn Mortensen, Tórshavn og Arne Mikkelsen, Hoyvík. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 8. januar 2005 verða Súsanna í Stórhúsi og Kim Ejdesgaard vígd í Býráðssalinum í Havn kl. 10.00. Vælkomst til brunch verður í Róðrarneystinum á Argjum frá kl. 11.00-17.30.

Leygarmorgunin hin 22. januar 2005 kl. 11.00 giftast í Kelduni í Skálafirði Tórfríð Arnfríðardóttir Jacobsen, úr Skálafirði og Dan Danielsen, av Strondum. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum á Strondum frá kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið á teirra stóra degi, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 442071, 250727, 448039 ella 748039 áðrenn 14. januar.

## 80 ÁR

31. desember fyllir Marna Olsen, Glyvrar, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin á Marknagarði frá kl. 12.00 til 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Nýggjársdag fyllir Jóna Hammer úr Oyndarfirði 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Villingardalsvegi 32, Tórshavn, frá kl. 17.00.

Mánadagin 3. januar 2005 verður Steingrim Joensen av Argjaboða 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 1. januar 2005 hava Svenny og Eilif Lisberg, Trongisvágur, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Og hann fór oman við teimum og kom til Nasaret og var teimum lýðin. Og móðir hansara goymdi øll hesi orð í hjarta sínum.*

*Lukas 2,51.*

Jesus var foreldrum sínum lýðin. Men lýdni hansara ímóti jarðisku foreldrunum var í djúpasta týdningi eisini lýdni ímóti Faðirinum í himli.

Har menniskju eru í Faðirsins tænastu, vil tað føra til lýdni, **ofta** til lýdni ímóti menniskjum, men **altíð** til lýdni ímóti Guði. Tí at tað **kunnu** gevast løtur, tá ið hvørki ber til at vera foreldrum ella øðrum menniskjum lýðin, ei heldur teimum ráðandi, tá ið t.d. krav teirra ella vilji er beinleiðis ímóti samvitsku okkara, og vit vita við okkum sjálvum, at tað beinleiðis er ímóti kristnum siðaarvi og virðum – ímóti Guðs vilja og góða ráði. Tá er hetta orðið galdandi, at Guði er meira at vera lýðin enn menniskjum, tí at fyrsta boð: »Tú mást ikki hava aðrar gudar enn meg«, er oman fyri allar aðrar lógir. Sum eisini tey fyrstu kristnu í Róm vóru greið yvir, tá ið tey sum lóglýdnir samfelagsborgarar annars kortini ikki vildu tilbiðja keisaran og harvið vóru borgarligari lóg ólýðin og tóku avleiðingarnar.

Lív okkara sum kristin eigur at bera í sær trúfesti og lýdni, og sum børn Faðirsins eiga vit ikki at kenna okkum ov stór ella ov góð til at boyggja okkum í lýdni, har Guð hevur sett menniskju yvir okkum. Tí eiga vit at siga við okkum sjálvi, tá ið okkara sjálvsøkna og ráðaríka lyndi hevur hug at stinga seg upp í okkum: »Eg eigi at vera í Faðirsins gerningi – í lýdni«.

Vit hava brúk fyri hjálp, um hetta skal eydnast okkum; men hvaðani kemur hjálpin? Her er hin heilaga Guðsmóðurin, Maria moy, okkum ein fyrimynd, tá ið sagt verður um hana, at hon goymdi øll hesi orð – Guðs orð – í hjarta sínum. Og við hesum í huga kunnu vit tí svara: »Vit fáa hjálp til tess millum annað við trúliga at søkja samfelag Faðirsins í halgidóminum, í hinum heilaga samfelagnum, orðinum, bønini, lovsanginum og hini heilagu kvøldmáltíðini«.

Í lýdni og við trúfesti eiga vit at útinna tann dagliga gerning, sum Faðirin hevur givið okkum, og ikki bert í sjálvsøkni tæna okkum sjálvum, men eisini medmenniskjum okkara.

**Emil Olsen, prestur**